UTTAN ÚR HEIMI

## Fáa 10 krónur um tíman

Ein sending hjá svenska útvarpinum hevur avdúkað, at arbeiðsmenn úr Slovakia, sum arbeiða á Volvo-verksmiðjuni í Gøteborg, fáa bara 10 krónur í løn umm tíman. Kanningin avdúkaði eisini, at slovakarnir arbeiða ímillum tíggju og tólv tímar um dagin allar sjey dagarnar í vikuni.

Talsmaðurin hjá Volvo, Christer Gustafsson, sigur við tíðindastovuna TT, at tann lága lønin er eitt úrslit av ES-reglunum um ein frían arbeiðsmarknað, og at svenska fyritøkan fylgir galdandi reglum. Hann avsannar kortini, at nakar fær 10 krónur um tíman, tí lønin er hóast alt hægri enn so, sigur hann.

Olle Ludvigsen, fakfelagsformaður, sigur, at svenska fakfelagið kann als ikki góðtaka ta lágu lønina hjá teimum slovakisku arbeiðsmonnunum. Hann vísir á, at slovakarnir fáa ikki meiri enn góðar 2.000 krónur um mánaðin, meðan teirra svensku starvsfelagar fáa einar 18.000 krónur meiri.

Sambært sendingini í svenska útvarpinum arbeiðs slovakarnir fýra vikur út í eitt, áðrenn teir fara heim at vitja nakrar dagar. So gongur leiðin aftur til Gøteborg.

## Stríð um gamla ferju

Danska stjórnin hevur nú vent sær til myndugleikarnar í India fyri at fáa teir at forða fyri, at ein gomul donsk ferja verður upphøgd á teirri vesturindisku strondini.

Trupulleikin við málinum er, at nógv asbest og onnur eitrandi evni eru í ferjuni "Kong Frederik IX". Skipið hevur ligið við bryggju í Korsør í fleiri ár, men herfyri varð tað selt til India til upphøggingar. Greenpeace og onnur hava mótmælt, at skipið verður upphøgt í India, tí har er at kalla einhki eftirlit við eitrandi evnum, og tí hevur danska stjórnin nú biðið indisku myndugleikarnar forða fyri, at tað 51 ára gamla skipið verður høgt upp.

Danski umhvørvismálaráðharrin, Connie Hedegaard, sigur seg vóna, at málið um donsku ferjuna kann skunda undir eitt orðaskifti í ST og altjóða sjóferðslufelagsskapinum IMO um, hvørjar reglur skulu galda, tá gomul skip verða seld øðrum londum til upphøggingar.

## Risaalda rakti ferðamanaskip

Fýra fólk fingu skaða, og sjógvur kom í 62 kømur, tá ein risastórt brot rakti tað stóra norska ferðamannaskipið "Norwegian Dawn" um vikuskiftið.

Skipið var á veg úr Bahamas til New York við 2.600 ferðafólkum, tá tað kom í illveður. Brotið, sum rakti skipað, var so stórt, at sjógvur kom inn í fleiri kømur heilt uppi á 10. hædd. Einki er kortini frætt um, at nakar fekk skaða.

Norska felagið Norwegian Cruise Line eigur "Norwegian Dawn", ið er í fastari sigling fram við amerikonsku eysturstrondini og í Karibiska Havinum.

## Hús á fjallatindi til leigu

Japanska veðurstovan bjóðar nú fólki at leiga eini hús, sum standa uppi á tí 3.776 metrar høga fjallinum Fuji.

Fuji er tað hægsta fjallið í Japan, og í mong ár hevur veðurstovan havt eina veðurstøð uppi á fjallinum. Men síðani september í fjør hava húsini staðið tóm, tí nú hevur veðurstovan fingið sær nútímans útgerð, sum hevur samband við fylgisveinar. Tí hevur veðurstovan ikki brúk fyri húsunum á Fuji longur.

Enn hevur eingin boðið sær til at leiga ta gomlu veðurstovuna. Fuji er gamalt gosfjall, men tað er kortini ikki orsøkin til, at eingin hevur víst áhuga fyri húsunum, tí har hevur einki gos verið síðani 1707. Orsøkin er heldur prísurin. Sambært blaðnum Mainichi Daily News kostar tað einar fimm milliónir krónur at halda ta gomlu veðurstovuna við líka - um árið.

# Japan fær onga umbering



*Fundurin ímillum uttanríkisráðharrarnar úr Japan og Kina gav einki úrslit*

*Mynd: Reuters*

**Kinesiska stjórnin vil ikki biðja japanar um umbering fyri, at kinesisk mótmælisfólk hava gjørt seg inn á japanskar ognir í Kina**

ÓSEMJA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Japanski uttanríkisráðharrin, Nobutaka Machimura, kom aftur sum av torvheiðum, eftir at hann um vikuskiftið var í Beijing og bað kinesisku stjórnina um umbering fyri, at kinesisk mótmælisfólk hava lopið á japanskar umboðsstovur og handlar í fleiri kinesiskum býum í seinastuni.

– Okkara stjórn hevur einki gjørt, sum gevur japanum nakra orsøk til at biðja hana um umbering, var svarið frá kinesiska uttanríkisráðharranum, Li Zhaoxing.

Tey kinesisku mótmælisfólkini eru í øðini, tí ein nýggj søgubók, sum verður brúkt í teimum japansku skúlunum, fer alt ov lætt um sannleikan, tá Japan hersetti Kina stutt undan seinna heimsbardaga. Tað er alment kent, at japanski herurin fór sera harðliga fram, og at bara í tí eina álopinum gjørdu japanar av við meiri enn 100.000 kinesisk sivilfólk.

Eygleiðarar siga, at tann nýggja søgubókin er bara ein partur av stríðnum ímillum tey bæði londini. Japan og Kina eru ósamd um rættindini til nakrar smáar oyggjar, tey eru ósamd um eina havleið, har olja kan vera í undirgrundini, og so eru tey eisini ósamd um Taiwan. Haraftурat kemur, at aftan á stóran búskaparvøkstur í fleiri ár hevur Kina yvirtikið plássið sum tað leiðandi landið í Fjareystri - eitt pláss, sum Japan hevur havt í mong ár.

# Noreg fer at svara aftur

**Norsku myndugleikarnir fara kanska at seta tiltøk í verk ímóti vørur úr ES aftur fyri revsitiltøkini, sum ES hevur sett ímóti norskum laksi**

LAKSASTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Kjell Magne Bondevik: - Noreg fer at svara ES-tiltøkunum ímóti norska laksinum*

Norska stjórnin setir nú hart ímóti hørðum í laksastríðnum við ES.

Á aðalfundinum hjá norska fiski- og alivinnufelagnum um vikuskiftið segði Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharri, at stjórnin hevur kunnað heimshandilsfelagsskapin WTO um, at Noreg fer møguliga at seta tiltøk í verk ímóti vørum úr ES-londunum fyri at fáa betri javnvág í samhandilin. Hann vildi kortini ikki siga, hvørjar ella hvussu nógvar ES-vørur talan kann verða um.

Bondevik segði, at ES-tiltøkini ímóti norska laksinum eru brot á reglurnar hjá WTO.

– Eg vil ikki brúka eitt orð sum handilskríggj, men eg vóni ikki, at vit koma í eina tílíka støðu, segði norski forsætisráðharrin.